## DAGSINS MEINING

# Tendrið eitt ljós!

Í dag er altjóða mannarættindadagur, og felagsskapurin Amnesty International heitir henda dag á fólk um at tendra ljós í vindeygunum fyri at vísa sín samhuga við samvitskufangum, sum sita víða hvar handan rimarnar. Talan er um fólk, sum sita í fongsli - oftast uttan rættarmál - tí tey hava ein annan húðalit, annað kyn, aðra trúgv ella hava eina aðra politiska sannføring enn valdsharrarnir.

Tað eru óivað mong, sum seta spurnartekin við, hví vit skulu vísa samhuga fyri samvitskufangum her á klettunum úti í Atlantshavi. Lond, sum seta fólk í fongsul tí tey ikki hava røttu trúnna ella røttu politisku áskoðanina, eru so fjart frá okkum, og valdsharrarnir gáa ikki um, um nakrir føroyingar gera vart við órættvísi í hesum ella hasum landinum. Soleiðis hugsa óivað mong.

Men soleiðis mugu vit ikki hugsa. Vit eru partur í altjóða samfelagnum og tað er týdningarmikið, at vit eisini eru við og stuðla arbeiðnum fyri mannarættindum, eins og tað hevði týdning, at vit eisini gjørdu vart við okkum í friðarrørsluni í áttatiárunum fyri at mótmæla tí vitleysu krígsdubbingini sum tá fór fram bæði eystan- og vestanfyri.

At vit gera vart við okkum og eru uppi í stríðnum fyri mannarættindum hevur eisini týdning fyri okkara ungu ættarlið, og vit mugu ikki gloyma at kunna og upplýsa um hesi viðurskifti, so tey ungu eisini verða tilvitandi um henda og aðrar líknandi spurningar, tí rættvísi og fólkaræði kemur ikki av sær sjálvum. Eisini hesum rættindum skulu vit stríðast fyri og støðugt vera á varðhaldi fyri at verja.

Føroyska deildin í Amnesty International hevur flestu árini síðani hon varð stovnað einaferð í sekstiárunum verið virkin. Nógv fólk hava gjørt eitt ómetaliga stórt og ósjálvsøki arbeiði í felagnum fyri samvitskufangar í eini roynd at fáa hesar leysar. At hetta arbeiðið hevur týdning fingu vit at vita fyri stuttum, tá skyldkona hjá samvitskufanga vitjaði her fyri at takka fyri stuðulin úr Føroyum.

Nú altjóða mannarættindadagur er, heitir Amnesty International Føroya deild á fólk um at senda eina heilsan - eitt kort ella eitt bræv - til nøkur av hesum fólkunum, sum verða forfylgd ella sum skulu verða í fongsli um høgtíðina, sum stendur fyri durum. Amnesty Internationals vísir á, at heilsurnar bera vón og eggjan í eini svárari tið.

Men heilsurnar siga eisini myndugleikunum, at altjóða samfelagið hevur eyguni eftir teimum. Tað kann gagna málunum hjá fangunum og verja teir og familjur teirra móti fleiri álopum.

Vit lata áheitanina hjá Amnesty um at stuðla fara víðari og heita á fólk um at sýna samhuga og tendra ljós í vindeygunum í kvøld fyri teimum, sum av órøttum sita í fongsli orsakað av teirra kyni, húðaliti, trúgv ella politisku sannføring.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jólaaftan í KFUK

**Aftur í ár halda tey jólaaftan í KFUK í Havn**

JÓL
*Tíðindaskriv*



Tað eru ikki øll, sum hava møguleika at vera saman við sínum kæru á jólum, og tað kunnu vera so nógvar ymiskar orsøkir til tað. Og í staðin fyri at sita einsamallur er gott at hava onkran at vera saman við jólaaftan.

Í KFUK í Havn hevur jólaaftan verið hildin á hvørjum ári síðani 1993, og tað verður tað eisini í ár.

Aftur í ár verða tað Sonja Klein og Holger Arnbjerg, sum saman við Jørgen Dahl fara at skipa fyri hesum tiltaki, ið plagar at vera sera hugnaligt.

Jólaaftan í KFUK verður hildin á sama hátt sum hjá teimum flestu.

Fólkini møta klokkan 19.00 til búgvið borð.

Tey fáa jóladøgurða við dunnu og øllum tí, sum plagar at hoyra til. Oman á er rís a la mande við mandulgávu. Jólaevangeliið verður lisið, og jólasálmar sungnir. Sjálvandi verður jólatræ at dansa um, og øll fáa persónligar jólagávur.

Umleið 25 fólk plaga at halda jól saman í KFUK.

Er tað onkur, sum kundi hugsa sær at sloppið við bili til jólaaftanshaldið, skulu tey boða frá. Syrgt verður eisini fyri, at øll koma trygt heim aftur.

Fyri at hava nóg mikið av mati og gávur til øll er neyðugt at tekna seg til jólaaftanshaldið. Freistin at tekna seg er 21. desember, og tað ber til at tekna seg í KFUK tlf. 311928 ella hjá Sonju og Holger tlf. 310177.

# Ókeypis vestur til Sørvágs til ókeypis cafekvøld

**Magni Christiansen og fleiri fara at luttaka á cafekvøldi í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági fríggjkvøldið 10.des., tá tað verður ókeypis at koyra ígjøgnum Vágatunnilin**

**Jákup Suni Lauritsen**

Ungdómsfelagið Libanon í Sørvági er eitt sera virkið felag. Hvørt fríggjakvøld verður skipa fyri tiltøkum fyri ungdómin í Vágum.

Komandi fríggjadag verður skipa fyri einum serligum tiltaki fyri vágafólki og gestum av fastlandinum.

### Magni signerar nýggja fløgu

Magni Christiasen sum er kendur um alt landið, fer við sínum góða country sangi at syngja og signera nýggju fløgu sína. Eisini verður hævi at keypa fløgur og bøkur.

### Dansur og drama

Tað hevur verið alt meira vanligt, at síggja tey ungu framføra ymiskar dansir og drama á møtitiltøkum í Føroyum seinastu árini.

Tey ungu børnini vísa eitt serligt dirvi og hegni við at framføra smáar søgur og leikir við andaligum innihaldi. Tey lata boðskapin tala gjøgnum rørslur og teirra vakra kropsmál.

Tiltakið byjar kl.19.00 og høvi, verður at støkka inn á gólvið, alt kvøldi tá ein hevur tíð og møguleiga.

### Góðar umstøður

Umstøðurnar at skipa fyri tílíkum tiltøkum er góðar í Missiónshúsinum í Sørvági, sigur Tórgunn Hjørleifsdóttur ungdómsleiðari.

Tá nú partafelagið Vágatunnilin hevur gjørt av, at lata bilarnar koyra ókeypis um Vestmannasund hetta kvøldið, er gott høvi at skipa fyri hesum tiltakinum. So kunnu gestir eisini koma til Sørvágs til eina hugna løtu.

Einki cafe kvøld uttan kaffi og okkurt til ábits. Aftur hesaferð fara kvinnurnar at dekka borð við nýbakaðum vaflum og drekka.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.